## Kendur klaksvíkingur út í bók

Leygardagin klokkan 15-17, verður hátíðarhald í Ósaskúlanum í Klaksvík í sambandi við, at Óli Olsen nú hevur skrivað bók um kenda klaksvíkingin Fisher Heinesen. Høvundurin verður sjálvur til staðar og fer at undirskrivað bøkur, sum eisini verður til keyps fyri serprís. Á hátíðarhaldinum fer Jóan Pauli Joensen, professari, at halda røðu og Karl Martin Samuelsen fer at syngja og spæla. Í bókini verður greitt frá, hvussu tað var at veksa upp í Klaksvík fyrst í farnu øld og tað verður eisini skrivað um leiklutin, Fisher Heinesen hevði í Læknastríðnum í Klaksvík. Bókin byggir á endurminningarnar og dagbøkurnar hjá Fisher Heinesen sjálvum og tað eru nógvar myndir í bókini.



## Sørvingar taka gamlan tátt upp

Nú eru 10 ár síðani, at kvøldseta var í Sørvági, men nú er ætlanin at taka hendan gamla táttin uppaftur. Sostatt verður kvøldseta við kaffi og kaku í skúlanum í Sørvági leygarkvøldið 17. novembur klokkan 19.30. Tá fer Sonni Jacobsen at siga frá um skúla og skúlabygging í Sørvági ígjøgnum tíðirnar. Samstundis fer Reðin Leonsson at vísa film úr Sørvági frá sekstiárunum, umframt ein film um einaferð, teir komu aftur úr Gáshólmi tíðliga í áttatarunum. Á kvøldsetuni verður eisini spurnarkapping ímillum býlingarnar Húsadal Mýrarnar. Tónleikinum standa Jóan Jakku Guttesen og Holgar Jacobsen fyri, men tað verður eisini felagssangur við harmonikuspæli afturvið. Aldursmarkið er 18 ár.

# Kalsoyingar ynskja tunnil til Klaksvíkar

**- Vit, kalsoyingar fáa helst ikki fast samband við Borðoynna í bræði. Men eg havi kortini hug at seta hol á eitt kjak um hetta málið, sigur Christian Andreasen, sum er ein av limunum í serstøku Mikladalsnevndini**





*Ein hugsandi linjuføring fyri fast samband undir Kalsoyarfjørð er hiðani av Syðradali og til Bumshamar í baksýni. – So fingu vit eina varandi loysn, sigur Christian Andreasen í Mikladali (innsett mynd)*

Mynd: Jens Kr. Vang

TUNLAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kalsoy:** Í løtuni er strandfaraskipið Sam álitið hjá kalsoyingum, og hetta eru tey sera væl nøgd við.

Neyðugt verður kortini at skifta hann út um nøkur ár. Og tað er í hesum sambandi, at Christian er komin við hugskoti sínum:

"Hví ikki gera ein undirsjóvartunnil til Kalsoynna, ístaðin fyri eitt nýtt strandfaraskip?!"

- Sam kundi saktans siglt nøkur ár aftrat, meðan ein arbeiddi við hini ætlanini. Tað hevði betýtt sera nógv fyri okkum, um vit bara vistu at vit fingu eina varandi loysn í framtíðini, sigur Christian,

Hann er tó fult greiður um, at hvørki hann ella nakar annar kalsoyingur kann forlanga at fáa ein undirsjóvartunnil í Kalsoynna, tá tað nýggja skipið er komið.

- Fingu vit ein slíkan tunnil ístaðin, høvdu vit fingið eina góða loysn, sum hevði verið til gleði og gagns fyri alt fólkið.

- Bæði skip og ferjulegur krevja nógv viðlíkahald, meðan ein tunnil er ein varandi loysn. Hesin møguleikin átti í øllum førum at verðið kannaður, sigur Christian við Sosialin.

Hansara hugsan er tí, at ein eigur at kanna møguleikan fyri føstum sambandi millum Kalsoynna og Borðoynna. Hetta kundi til dømis verið millum Syðradal og Bumshamar.

Hinvegin dugir Christian væl at síggja, at ein slíkur tunnil verður hvørki boraður í dag ella í morgin.

- Tað hevði ikki verið moralskt rætt at fingið bæði nýggja ferju og undirsjóvartunnil. Men einaferð í framtíðini eigur ein at fara undir hesa ætlanina.

### Oyggin hevði blómað

Tað var longu í sambandi við ætlanina um Norðoyatunnilin, at hugsanin kom upp at knýta Kalsoynna upp í meginøkið.

Ein hugsan var at gera ein "avstikkara" til Kalsoynna, soleiðis at tey í framtíðini skuldu sleppa undan at ferðast um fjørðin, um tey skuldu til Klaksvíkar.

Ætlanin varð tó ikki framd í verki, helst orsakað av fíggjarligum viðurskiftum og tekniskum forðingum. Men hetta hevur kortini ikki tikið áhugan burtur hjá Christiani at útvega oyggjafólki sínum bæði gott og fast samband við umheimin.

Hugskotið metir hann ikki vera heilt burturvið, nú oljuprísurin er høgur og fer uttan iva at hækka uppaftur meiri í framtíðini.

- Tað er heilt vist, at fingu vit ein undirsjóvartunnil, so hevði Kalsoyggin blomstrað ordiliga, staðfestir Christian, ið dagliga siglir sum maskinmeistari í Norðsjónum.

### Fáar avlýsingar

Christian hevur sjálvur sitið í bygdaráðnum í heimbygdini Mikladali í tíðini, áðrenn lagt varð saman við Klaksvík.

Hinvegin er hann ein av limunum í teirri serstøku og staðbundnu Mikladalsnevndini undir Klaksvíkar kommunu. Í hesi nevndini situr borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen sum formaður.

Og tað var á fundi í nevndini fyrr í summar, at hann legði fram hugsan sína í hesum máli. Úrslitið av hesum gjørdist eitt skriv frá Mikladalsnevndini, dagfest 18. september 2007 við heitinum "Kanning av møguligum undirsjóvarsambandi um Kalsoyarfjørð".

Fyri Christian – og helst mangar aðrar kalsoyingar – er greitt, at verandi sjósambandið við strandfaraskipinum Sam er gott.

Orsøkin til hetta er, at Sam kann flyta bæði smærri og størri akfør. Men tað sum oyggjarfólkið fegnast mest um, man kortini vera tað at regulariteturin hjá Sam er sera góður. Tað er henda regularitetin sum eingin teirra ynskir at missa.

Sam er lágt bygdur og tekur tí ikki so nógvan vind á seg. Ein nýggjur Sam verður uttan iva størri og hægri, og fer tí at hava trupl- ari við at leggja at á ferjuleguni í Syðradali í øllum líkindum.

- Tað koma sjálvandi dagar, tá ein ikki kann leggja at í Syðradali. Soleiðis var júst í morgun, men annars er hann álitið sjálvt, staðfestir Christian.

> *Skal ein brúka einar 45-50 mió krónur til eitt nýtt skip, - hví ikki brúka peningin á øðrum staði og fara undir fyrireiking av einum undirsjóvartunli til Kalsoynna?*

> *Tað er heilt vist, at fingu vit ein undirsjóvartunnil, so hevði Kalsoyggin blomstrað ordiliga*
> *(Christian Andreasen, limur í Mikladalsnevndini)*

## 50 mió til nýggjan tunnil

Sam, sum tekur 17 bilar, varð bygdur í 1975 og hevur longu fleiri ár á baki. Væntast kann at hann skal skiftast út um fá ár.

Tað er í hesum sambandi, at Christian hevur sagt sína hugsan í hesum máli: Skal ein brúka einar 45-50 mió krónur til eitt nýtt skip, - hví ikki brúka peningin á øðrum staði og fara undir fyrireiking av einum undirsjóvartunli til Kalsoynna?

- Tað einfaldasta hevði verið, at ein ístaðin brúkti hesar milliónirnar sum stovnsfæð til eitt partafelag, sum skal standa fyri at gera tunnilin.

- Við hesum høvdu vit fingið eina varandi loysn til samferðsluna í Kalsoynni, sigur Christian.